gult4 cyan4 magenta4 svart4

Mangla bingjupláss

Tað er trupult at fáa pláss til allar bingjurnar, sum skulu brúkast á vestara havnaøki í Klaksvík

HAVNAØKI
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Tørvur er á meiri bingjuplássi á vestara havnøki í Klaksvík, tí tað er trupult at finna pláss til allar bingjurnar, sum skulu brúkast.

Hetta sigur stjórin á Northern Fish Cold Storage (NFCS), Anthonius Olsen, við lokalblaðið Norðlýsið fríggjadagin.

NFCS er frystihús, sum landar og avgreiðir veiðina hjá skipum til útflutning. Í síðstu viku landaði Næraberg á virkinum, hesa vikuna hevur Akraberg landað, og harafturat útflytir virkið eisini rogn.

– Vit eru í dýrastu neyð við bingjuplássi, og bara tað, at vit skulu flyta bingjur aftur og fram, kostar okkum pengar, sigur Anthonius Olsen við Norðlýsið.

Ætlanin er at byggja nýtt virkið á vesta havnaøki, og hetta virkið fer at taka nakað av verandi bingjuøki, og tað heldur stjórin á NFCS fer at gera virkini verri kappingarfør, tí tað verður so trongligt á havnaøkinum.

Byggja út í Ánunum

Klaksvíkar býráð hevur fleiri ferðir viðgjørt havnaviðurskiftini, og á seinasta býráðsfundi varð avgjørt at gera meiri við góðshavnina í Ánunum – stutt norðanfyri Klaksvík.

Býráðið ætlar at fylla 5000 fermetrar afturat út, og tað fer so at geva ein samlað økið upp á umleið 11.000 fermetrar, sum skulu brúkast sum góðshavn.

Borgarstjórin í Klaksvík ásannaði í samabandi við hesa avgerð, at neyðugt verður at byggja út í Ánunum, tí tað er so trongligt á vestara havnaøki.

Avbjóðandi sølustarv

Vit søkja eftir einum sølufólki til útflutningsdeildina. Persónurin skal hava dagliga kontakt við okkara kundar, sum eru flestallir føroyskir útflytarar. Tú skalt starvast á høvuðsskrivstovuni hjá Skipafelagnum í Havn og vera ein partur av einum teami.

Arbeiðið

Tú fert at arbeiða tætt saman við marknaðarleiðaranum, samskiparanum og hinum fólkunum í útflutningsdeildini. Tú skalt hava kundakontakt pr telefon og vitja kundar, útrokna tilboð, viðlikahalda og viðariútvikla okkara samstarv við agentar /undirleverandørar í útlandinum, gera marknaðaranalysur og arbeiða við hagtølum.

Persónslýsing



- Arbeiðir vael saman við øðrum og í bólki
- Ert fyrikomandi
- Ert kundavinarligur
- Hevur gott yvirblikk
- Kanst orðna fleiri ting í senn
- Dugir vael enskt í skrift og talu
- Kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum

Tínar royndir

Tú mást hava áhuga fyri fiskivinnu og vitan um hana. Best hevði verið, um tú hevur royndir frá arbeiði í vinnuni.

Vit hugsa okkum, at tú ert eksaminerður eksportørur, akademiøkonomur, speditørur, eksportteknikari ella okkurt tíllíkt. Tú mást duga at arbeiða við Microsoft-telduforritum.

Tú fært

Tú fært eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

Lønin verður eftir avtalu.

Send tína umsókn

Um hetta starv hevur tín áhuga, so send okkum eina umsókn við tínum CV, prógvum o.ø. skjótast gjørligt og áðrenn mánadagin 20. apríl 2001. Skriva til Skipafelagið Føroyar, Eystara Bryggja, P.O. Boks 47, 110 Tórshavn, Att: Tórheðin Jensen. Tlf.: 31 12 25. Um tú hevur onkran spurning um arbeiðið, so kanst tú ringja til Tórheðin.

Skipafelagið Føroyar varð stovnað í 1919 og er størsta føroyska flutningsfelagið. Skipafelagið Føroyar hevur skip í linjufarti millum Føroyar, Skotland og Danmark. Meginparturin av føroyskum inn– og útflutningi verður fluttur á okkara skipum. Skipafelagið Føroyar veitir eisini aðrar tænastur, sum t.d. agency, supply base og hurð-til-hurð tænastu

Skipafelagið Føroyar

Skipafelagið Føroyar · Eystara Bryggja · P.O. Box 47 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 31 12 25 · Fax +298 31 13 13

Barok latið upp

Barok í Klaksvík hevur nú latið upp, og talan er um eitt sera hugnaligt stað

Barok í Klaksvík leggur seg eftir teimum tilkomnu, sum vilja hava eitt sindur av stíli

BAROK
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Hóskvøldið lat Barok í Klaksvík upp. Talan er um eina hugnaliga pub, har nógv er gjørt burtur úr innbúgvi og umhvørvi.

– Vit ælta okkum at halda eitt ávíst støði, og vit vóna sjálvandi, at fólk vilja hava eitt slíkt tilboð, sigur Jonhard Larsen, sum rekur staðið saman við pápa sínum.

Barok verður opið gerandisdagar, og um vikuskiftini verður dansur. Í fyrstu syftu verður talan um plátuvendarar, men møguleiki er eisini at hava livandi tónleik.

Stórskiggin í Barok skal eisini brúkast, og her verður fyrst og fremst hugsað um at vísa fótbóltsdystir.

Barok hevur skeinkiloyvi og ætlar eisini at bjóða okkurt lætt til matna eisini.

Freistin var úti í gjár

Í gjár gekk freistin hjá Smyril Line fyri at fáa viðurskiftini í sambandi við byggingina av nýggju Norrønu út.

Týska skipasmiðjan, sum skal byggja nýggja ferðamannaskipið, hevur kravt størri fíggjarliga trygd frá Smyril Line, og fyri at ganga hesum krøvum á møti hevur Smyril Line hækkað partapeningin við 125 milliónum.

Men feløgini, sum eru sinnað at seta pening í felagið, hava sett krøv um afturgjaldingina av lánum, og tað er hetta sum Smyril Line skuldi fáa upp á pláss í gjár.

Týska skipasmiðjan ætlar at fara undir byggingina av nýggjur Nørronu seinni í ár, og skipið skal verða liðugt í 2003.

gult5 cyan5 magenta5 svart5

Fregnir - ein frísk nál í føroyska blaðheiminum

Dimmalætting 124. árgangur, Sosialurin 68 árgangur, Dagblaðið 66. árgangur, Norðlýsið 51. árgangur og Oyggjatíðindi 24. árgangur.Fregnir er komið á gøtuna. 1. árgangur nr. 1. Vikublaðið, hvørs óddagrein liggur á sjálvstýrissíðuni, men hvørs innihald annars er óheft flokkspolitiskt liggur í sølubúðunum. Frískt og óspilt og verður ikki ørvísi enn tað sum verður lagt í tað av tilfari í framtíðini.

Justinus Leivsson Eidesgaard

24 ár eru ligin síðan ein stórhending av slíkum slag hendi í føroyska blaðheiminum, tá kom Oyggjatíðindi fyrstu ferð á gøtuna, prentað sum dagblað á vanligum avíspappíri og í hesum tíðarskeiði eru fleiri bløð deyð, ella liggja í dvala. 14. september svevur, Tingakrossur svevur og Dagblaðið hevur slept vanligum tíðindaflutningi. Hetta blað er einasta eftir av teimum gomlu flokkspolitisku bløðunum, sum enn stendur við gamla setningin, at vera boðberi hjá flokkinum.

Støddin á Fregnum er sum á Dimmalætting og fólkini á Fregnum hava megnað at skapt eina sera flotta útgávu, fyrsta útgávan. Flott uppsettar greinar, nógv luft, leikur við myndum og skemtiligum speisemi í tekstinum.

Tørvur á slíkum blaði

Ábyrgdarblaðstjórin á Fregnum, Sjúrður Skaale er ikki nýggjur í føroyska blaðheiminum, Hann hevur starvast sum journalistur á Sosialinum, Dimmu og í sjónvarpinum. Hann hevur eisini á heilt ungum árum roynt seg sum myndamann á Tingakrossi.

-Vit eru sera spentir at vita, um marknaður er fyri einum vikublaði í Føroyum. Tað er eyðsýnt, at tørvur er á tí. Vit fara at halda okkum til evni, sum krevja drúgva tíð at viðgerða og sum hini bløðini ikki vanliga hava stundir til at taka sær av, sigur Sjúrður Skaale.

-Tilfarið í blaðnum er óheft. Vit eru óheftir flokkspolitiskt. Oddagreinin er á fullveldisleið og tað halda vit er neyðugt. Oddagreinarnar í Dimmu og Sosialinum eru ikki á fullveldisleið, so her er ikki javnvág í, sigur Sjúrður Skaale.

-Vit vera ikki málgagn fyri nakran flokk. Tað er rætt, at politikkarar hava sett pening í blaðið, men av teirri orsøk fáa teir ikki ávirkan, sigur Sjúrður Skaale.

Blaðið er sterkt peningaliga. Setningurin var at hava eina millión í partapeningi at byrja við, hetta mál er ikki rokkið enn, men ikki er langt á mál.

Ætlanin er ikki í framtíðini at fara at geva Fregnir út sum dagblað.

Sjúrður Skaale, blaðstjóri, troyttur, við fyrstu útgávuni av Fregnum.

Mynd: Jens Kr. Vang

Variant - Vøggan og Inntech

Nú er nógv nýggj vøra heimkomin

Sjálvandi hevur Inntech VVS nógv gott til varman og ventilatiónina.

Vøggan hevur hópin av nýggjum barnavognum og barnastólum á goymslu

Teir væl umtóktu vognarnir TRILLE og ROXAN og CONDOR

INNTECH 3 í einum á ovaru hæddini á FK í Saltangará. Kom inn á ovaru hæddina á FK og síggj okkara úrvæl.

Eisini hava vit fingið barnaklæðir av merkinum CLAIR og CHICCO

Variant hevur fingið nógvar nýggjar og lekrar gávulutir til tey yngru

Variant • Vøggan• Inntech

Tlf. 449 588 • Fax 449 499